# Oyggin sýnir lokala list

Í dag letur upp framsýning í Gallarí Oyggin á Tvøroyri. Talan er um lokalar framsýnarar, ið borðreiða við olju- og akrylmálningum. Tey, sum sýna fram, eru Signund Andreassen, Tórger Strøm, Brynjolvur Dambjørg, Osmund Nolsøe og onnur. Undir ferninseringini, sum byrjar klokkan 17, syngur og spælir Sigmund Andreassen.



# Heini lesur úr bók síni

Í kvøld klokkan 20 verður hugnaløta í Miðlahúsinum, har Heini Olsen fer at lesa burtur úr nýggju bók síni»Meg minnist og ørminnist«. Heini Olsen er pensjóneraður verkfrøðingur, og er sera góður frásøgumaður. Í sambandi við framløguna í Miðlahúsinum fer bygdamaður Heina úr Vestmanna, kendi trobadururin Martin Joensen, at syngja og spæla nøkur av sínum kendu løgum. Fyrireikararnir gera vart við, at til ber at ogna sær bókina og fáa rithøvundan at signera.



Gransking skal, sambært vinnumálaráðharranum, Johan Dahl, hava munandi betri kor og umstøður frameftir

# Arbeiða við granskarapark

**Í svari til Bjarna Djurholm í løgtinginum í gjár sigur Johan Dahl, vinnumálaráðharri, at landsstýrið arbeiðir víðari við málinum um granskarapark, sum undanfarna ABC-samgonga legði lunnar undir**

GRANSKING
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

»Endamálið við hesum lógaruppskoti er, at geva landsstýrismanninum heimild til at stovna partafelag, sum skal reka granskaraparkina og annað virksemi, ið hóskar saman við virkseminum hjá granskaraparkini annars. Partafelagið skal stuðla menning og vøkstri av vitanargrundaðum fyritøkum og felagsskapum og leiga út hølir til hetta endamál, umframt granskingar og menningarverkætlanir. Umframt at byggja granskarapark, fevnir hetta m.a. um útleiðan til granskarar, fyritøkur, stovnar og verkætlanir av hølum og kanningarstovum til gransking og menning, ráðgeving viðvíkjandi fíggingarmøguleikum og løgfrøðiliga og roknskaparliga ráðgeving og gransking innan serliga humana genomics, ídnaðarliga biotøkni og djóra genomics«.

Soleiðis byrjaðu viðmerkingarnar til tað lógaruppskotið, sum vinnumálaráðharrin í undanfarnu ABC-samgongu, Bjarni Djurholm, legði fyri tingið í fjør heyst, men sum fall burtur, tá val varð útskrivað fyrr enn ætlað.

Bjarni Djurholm hevur nú spurt sitandi vinnumálaráðharra, Johan Dahl, hvørjar ætlanir sitandi samgonga hevur við gransking í Føroyum.

Munnligi fyrispurningurin, ið settur og svaraður varð í tinginum í gjár, er soljóðandi:

1) Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin fyri vinnuligari gransking?

2) Hvørjar møguleikar sær landsstýrismaðurin í biotøkniligari gransking?

3) Ætlar landsstýrismaðurin at leggja fyri Løgtingið uppskotið um granskarapark, sum undanfarna ABC-samgonga legði fyri tingið?

### Raðfesta gransking

Í svari sínum slær Johan Dahl fast, at samgongan hevur ítøkiligar ætlanir við gransking í Føroyum.

Svarið til spurning 1) er soljóðand:

»Sitandi samgonga hevur sett sær fyri at arbeiða víðari við málinum um Granskarapark. Sum ein liður í hesum arbeiði verður skipað fyri einum átaki í Norðurlandahúsinum tann 5. desember.

Endamálið við degnum er, at skunda undir vinnuligu granskingina og fáa gongd á aftur málið, at skapa vinnuligari gransking og innovatión tær bestu vakstrarumstøðurnar«.

Eisini í svarinum til spurning 2) er landsstýrismaðurin positivur:

»Undirritaði sær stórt vakstrarpotentiali í m.a biotøkniligari gransking. Tí, royndir frá grannalondunum vísa, at miðvís satsing og raðfesting innan vinnugransking, kann hava sera positiv árin á samfelagsbúskapin, bæði í mun til ein øktan stovningartíttleika av nýggjum vitanartungum vinnum, og í mun til at draga til sín"knowhow" fyritøkur og váðafúsan kapital.

Herundir eisini positiv árin í mun til at draga til sín granskarar og onnur við fakligum førleika og útbúgving frá hægri lærustovnum.

Og postiv árin á granskingarsamstarv millum vinnuna og almennu granskingarstovnarnar«.

Svar trý vísir til svar eitt:

»Sum nevnt undir ad. 1, so ætlar samgongan at arbeiða víðari við málinum. Endalig støða er tó ikki tikin til ítøkiligt lógaruppskot«.

Tað stutta av tí langa er sostatt, at nýggja samgongan hevur í kvittanum at leggja stóran dent á at skapa eitt gott granskingar umhvørvi í Føroyum.

# Multiresistentar bakteriur á ráðstevnu

**Í morgin, fríggjadagin 28. november, verður skipað fyri ráðstevnu um MRSA og multiresistentar bakteriur á Hotel Føroyum. Umleið 150 heilsustarvsfólk verða við á ráðstevnuni**

RÁÐSTEVNA
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

20-30 tey seinastu árini hava fleiri og fleiri sløg av bakterium útviklað antibiotikaresistens. Hetta hevur ført við sær, at tað er vorðið meira og meira torført at viðgerða infektiónir. Í summum førum er ongin viðgerð møgulig.

Stafylokokkar, ið menna resistens ímóti flestu sløgum av penisillini er vorðið vanligt fyribrigdi í útlondum. Í fleiri evropeiskum londum eru næsten 50 prosent av stafylokokkunum meticillin-resistentir. Higartil eru tað einans umleið 2 prosent í Danmark.

Orsøkin til at bakteriur menna resistens ímóti antibiotika, er ovurstóra misnýtslan av antibiotika um allan heimin. Tey umleið 60 árini, antibiotika hevur verið brúkt ímóti infektiónum, hava bakteriurnar so at siga lært at verja seg fyri antibiotika, soleiðis at tað er vorðið minni og minni virkið.

Í Føroyum eru umleið 20 tilburðir av antibiotikaresistentum bakterium staðfestar trý tey seinastu árini.

### Ráðstevna

Føroyska heilsuverkið hevur sett sær sum mið, at MRSA ikki skal spjaða seg í Føroyum, og eru tiltøk sett í verk til tess at forða spjaðing. Føroyingar ferðast um allan heim, og av og á hendir tað, at teir verða innlagdir á okkurt útlendskt sjúkrahús. Nógvir sjúklingar verða viðgjørdir á donskum sjúkrahúsum, har ein eisini kann verða smittaður við MRSA.

Tann 28. november 2008 verður ráðstevnu á Hotel Føroyum fyri heilsustarvsfólk um MRSA og multiresistentar bakteriur.

Endamálið við ráðstevnuni er at greina evni, og at lýsa tey fyribyrgjandi tiltøkini, ið higartil eru sett í verk, serliga í Danmark, Grønlandi og í Føroyum. Men av tí, at spjaðingin av antibiotika-resistentum bakterium er ein heimsumfatandi trupulleiki, verður spurningurin eisini lýstur í hesum høpi. Tann bráða økingin birtir eisini undir spurningin um viðgerðarmøguleikarnar i framtíðini. Umleið 150 heilsustarvsfólk fara at verða við í ráðstevnuni, verður upplýst í tíðindaskrivi.

